## Nógv óhapp á sjónum

Ein kanning av arbeiðs- og trygdarumstøðunum umborð á íslendskum skipum avdúkar, at næstan hvønn dag koma fráboðanir um óhapp, har fólk fáa skaða undir arbeiði umborð. Kanningin umfatar allar fráboðanir í árunum frá 2001 til 2005, og hon staðfesti, at hesi árini fekk tryggingarstovnurin 1.787 fráboðanir um óhapp, har fólk høvdu fingið skaða. Herumframt vóru 17 vanlukkur, sum kravdu mannalív. Umleið 90 prosent av fráboðanunum vóru um tilburðir umborð á fiskiskipum. Kanningarúrslitið skal nú brúkast til at bøta um trygdina umborð á skipunum, skrivar Mogunblaðið.



## Flyta úr Grønlandi

Hagtøl hjá grønlendsku hagstovuni vísa, at í 2008 fluttu 3.175 fólk úr Grønlandi, meðan 2.537 fluttu til Grønlands og fingu sær bústað har. Sostatt var nettofráflytingin 638 fólk. KNR skrivar, at fráflytingin er vaksin støðugt tey seinastu fimm árini. Í 2004 var munurin 236 fólk, men í 2008 var talið næstan tríggjar ferðir størri. Fólkatalið í Grønlandi minkaði í 2008 fjórða árið á rað. Tann 1. januar í 2005 búðu 56.969 fólk í Grønlandi, men tann 1. januar í 2009 var talið minkað til 56.194 fólk ella 715 færri, skrivar KNR.

# Íslendingar bíða við næstu útbjóðing

**Bara tvey oljufeløg søktu um leitingarloyvi í tí fyrsta íslendska útbjóðingarumfarinum, og tá avtornaði, tóku bæði umsóknina aftur. Tað skal ikki henda aftur**

OLJULEITING

*Árni Joensen: arni@sosialurin.fo*

Tað kom íslendsku myndugleikunum dátt við, at bara tvey feløg vístu áhuga fyri at sleppa at leita eftir olju og gassi í Drekaumráðnum í landnyrðing úr Íslandi, tá fyrsta útbjóðingin var í fjør. Uppaftur verri varð hýrurin, tá bæði feløgini tóku umsóknir sínar aftur, tí tey metta verkætlanina vera ov váðamikla.

Íslendingar ætla ikki at koma í somu støðu aftur. Nú um ársskiftið segði Guðni A. Jóhannesson, orkumálastjóri, at síðani tey bæði feløgini tóku sínar umsóknir aftur, hava íslendsku myndugleikarnir havt samband við te og onnur felag fyri at fáa greiði á, hví áhugin fyri at leita var so lítil, og um nakað kann gerast við tað.

Orkumálastjórin sigur við Fréttablaðið, at tað næsta útbjóðingarumfarið verður ikki, fyrr enn vissa er fingin fyri, at feløg veruliga hava áhuga fyri at fara at leita. Hann leggur tó afturat, at kemur eitt felag og vil sleppa at leita á einari ávísari leið, kann tann leiðin bjóðast út fyri seg.

### Ongan skund

Umframt oljufeløg hava íslendingar havt samband við feløg innan oljuvinnuna, og á hesum fundum kom fram, at tað er neyðugt við fleiri seismiskum kanningum á Drekaleiðini. Haraftturat høvdu feløgini ynski um, at royndir verða tiknar av havbotninum fyri at vita, um nøkur tekin eru um kolvetni. Guðni A. Jóhannesson sigur, at amskiftið millum Orkumálastovnin og feløgini heldur fram. Hann sigur, at stovnurin hevur ongan skund, hóast eingin leiting spurdist burtur úr tí fyrsta útbjóðingarumfarinum, og soleiðis sum støðan á altjóða fíggjarmarknaðunum er.

- Tíðin arbeiðir við okkum. Fyrr ella seinni fara menn at vísa leiðini størri áhuga, men royndir í øðrum londum vísa, at tað kann taka tíð, sigur íslendski orkumálastjórin við Fréttablaðið.




*Drekasvæðið skal kannast nærri, áðrenn leitiloyvi har verða boðin útaftur*

*Kort: Morgunblaðið*

# Oljuprísurin kanska 100 ella 125 dollarar í ár

**Serfrøðingar innan oljuhandil eru á einum máli um, at prísurin á ráolju fer at hækka í ár, og at hann kann koma upp á 100 dollarar fyri tunnuna**

OLJUMARKNAÐUR

*Árni Joensen; arni@sosialurin.fo*



*Summir serfrøðingar vænta, at oljuprísurin fer upp um 100 dollarar og kanska endar uppi á 125 dollarum í ár*

*Mynd: Aftenposten*

Norska Finansavisen hevur spurt 20 greinarar, íleggjarar, leiðandi stjórar og aðrar serfrøðingar um, hvussu oljuprísurin fer at hátta sær í ár, og niðurstøðan aftan á samrøðurnar er, at oljan fer at dýrka í 2010.

Meiri enn helmingurin av teimum spurdu serfrøðingunum siga seg vænta, at oljuprísurin fer at koma upp á 100 dollarar í ár, og at hann kanska fer uppum. Næstan allir eru sannførdir um, at ímóti ársenda í ár verður oljan í hvussu er dýrari, enn hon er nú.

At oljuprísurin fer upp kemst av, at altsamt minni olja kemur út á marknaðin, og lutfallið millum útboð og eftirspurning trýstir prísin upp. Tað sama ger framgongdin í heimsbúskapinum.

- Vøkstur í heimsbúskapinum økir eftirspurningin eftir olju og serstakliga í Asia. Hetta hava vit longu sæð, og eg vænti, at hendan gongdin fer at standa við, sigur ein av serfrøðingunum, Ståle Kyllingstad, við Finansavisen.

Ein annar, Erik Karlstrøm, sigur við blaðið, at gongdin í oljuprísinum í ár verður nær tengdt at, hvussu væl tað fer at eydnast altjóða fíggjarmarknaðunum at fóta sær aftur eftir kreppuna. Sjálvur væntar hann, at oljuprísurin kann koma heilt upp í 125 dollarar fyri tunnuna í hesum árinum.

Finansavisen skrivar, at ein tilsvarandi meting, sum blaðið fekk frá serfrøðingunum fyri einum ári síðani, helt.